## Revsa Juve-fjepparar

Leiðslan í italsku liguni hevur gjørt av, at næsta heimadyst hjá Juventus skulu hurðarnar til tað eina áskoðaraumráðið verða afturlatnar. Hetta verður gjørt sum revsing, afturfyri at Juventus-fjepparanir í »Curva Sud« komu við rasistiskum rópum undir steypadystinum ímóti Napoli mikudagin. Síðsta kappingarár fekk Juventus eina líknandi revsins, tá liðið mátti spæla ein dyst heilt uttan áskoðarar eftir rasistisk róp, men hesa ferð komu rópini bara frá teimum mest víðgongdu fjepparunum.



## Hálvt ár í Arsenal

35 ára gamli verjuspælarin, Sol Campbell, hevur skrivað undir sáttmála við gamla felag sítt, Arsenal, ið røkkur hetta kappingarárið út. Campbell, sum spældi við Arsenal frá 2001 til 2006, hevur verið uttan sáttmála síðani síðsta summar, men skal hava víst dygdir og form, ið rættvísgera, at hann nú kann styrkja skaðaplágaðu verjuna hjá Arsenal. Tilsamans hevur Sol Campbell spælt 73 dystir á enska landsliðnum og skotið eitt mál fyri Ongland.

# Meistaraligt spæl frá Chelsea



Anelka gekk undan við tveimum málum, tá Chelsea leygardagin vant burtur úr Sunderland, sum ikki hevur vunnið síðani november mánað, tá liðið á heimavølli basti Arsenal 1-0

Mynd: Polfoto

**Eftir fleiri dystir við svingandi úrslitum og ikki heilt so sannførandi avrikum, fekk Chelsea sanniliga staðfest, at teir eru besta og heitasta boðið til at vinna Premier League**



rolant@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam

7-2! Tað var úrslitið av dystinum millum Chelsea og Sunderland leygardagin. Og tað var órættvíst – ikki mótvegis Sunderland men mótvegis Chelsea, sum hevði allar møguleikar at gerast fyrsta liðið í bestu ensku fótbóltsdeildini, sum vann ein dyst við einum tveysiffraðum tali. So avgjørd eru fleiri bretsk bløð, eitt nú The Sun og Daily Mail.

Daily Mail fer so langt sum at spáa, at leygardagurin helst var dagurin, tá Chelsea vann enska meistaraheitið 2010.

### »Svar på tiltale«

Soleiðis kann ein dystur venda øllum á høvdið. Støðan hjá Chelsea var annars ikki nakað at reypa av undan dystinum. Av teimum seinastu seks dystunum hevði liðið einans vunnið tveir – restin var eitt tap fyri Manchester City og javnleikir í móti Everton, West Ham og Birmingham.

Í Onglandi vóru tey eisini farin at spekulera í, hvussu nógv African Cup of Nations fór at kosta Chelsea. Gaman í, liðið er sterkt, men hvussu kann missurin av Drogba, Essien, Kalou og Mikel ikki merkja liðið negativt, varð spurt.

Svarið kom leygardagin og svarið var tað, danir kalla svar på tiltale!

### Minniligt mál frá Cole

Av teimum sjey málunum, taldu fimm tey fyrstu fimm ymsar málskjúttar. Anelka setti hol á í áttanda minutti, og 26 minuttir seinni høvdu Malouda, Cole og Lampard eisini gjørt hvør sítt mál. Eftir steðgin kom Ballack eisini upp á talvuna, áðrenn Anelka og Lampard aftur gjørdu vart við seg.

Teir fimm málskjúttarnir prógva eisini breiddina á liðnum. Tað er eingin einmansherur, men eitt lið, sum ikki einans skapar úrslit, men eisini undirheldur.

Besta dømi um hetta var málið til 3-0 í 22. minutti. Her varð breiddin á liðnum staðfest saman við meistaraligum undirhaldi.

Tað er nevniliga rár hending, at ein vinstri bakkur skorar og helst uppaftur meira sjáldsamt, at ein miðverji leggur upp til eitt mál. Leygardagin legði miðverjin og liðformaður Terry upp til málið hjá Cole.

Eitt frágerða gott mál, sum ikki gjørdist minni serstakt av, at tað var mál nummar 18.000 í Premier League!

### Meistaraligt spæl

Hóast sjey mál kunnu teir í Chelsea ikki vera heilt nøgdir. Tey bæði málini, Sunderland fekk er eitt, men annað er tað, at Chelsea ikki fekk meira burtur úr teimum 29 royndunum upp á mál, ið teir høvdu í dystinum.

Somu hagtøl siga eisini, at Chelsea hevði 15 hornaspørk í dystinum, men at einki av teimum varð umsett til mál.

Hinvegin kann Ancelotti, venjarin hjá Chelsea, fegnast um, at hansara menn høvdu bóltin 71 prosent av tíðini. Hann kann fegnast um mongu málskjúttarnar. At eingin av hansara monnum fekk gult kort, og at hvørki Cole ella Terry, sum vórðu útskiftir í steðginum við smærri snuddum, hava fingið stórvegis skaða.

Men mest av øllum kann Ancelotti fegnast um meistaraliga spælið, hansara mans vístu á vøllinum leygardagin, tá Chelsea vant burtur úr Sunderland.

### Premier League

| | | dystir | v | | j | | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Chelsea | 21 | 15 | - | 3 | - | 3 | 52 | 18 | 34 | 48 |
| 2 | Man Utd. | 22 | 15 | - | 2 | - | 5 | 49 | 19 | 30 | 47 |
| 3 | Arsenal | 21 | 14 | - | 3 | - | 4 | 55 | 23 | 32 | 45 |
| 4 | Tottenham | 21 | 11 | - | 5 | - | 5 | 42 | 22 | 20 | 38 |
| 5 | Man City | 21 | 10 | - | 8 | - | 3 | 42 | 30 | 12 | 38 |
| 6 | Aston Villa | 21 | 10 | - | 6 | - | 5 | 29 | 18 | 11 | 36 |
| 7 | Liverpool | 21 | 10 | - | 4 | - | 7 | 38 | 26 | 12 | 34 |
| 8 | Birmingham | 21 | 9 | - | 6 | - | 6 | 21 | 19 | 2 | 33 |
| 9 | Fulham | 21 | 7 | - | 6 | - | 8 | 26 | 24 | 2 | 27 |
| 10 | Everton | 21 | 6 | - | 8 | - | 7 | 30 | 34 | -4 | 26 |
| 11 | Stoke | 21 | 6 | - | 7 | - | 8 | 19 | 26 | -7 | 25 |
| 12 | Blackburn | 21 | 6 | - | 6 | - | 9 | 23 | 39 | -16 | 24 |
| 13 | Sunderland | 20 | 6 | - | 5 | - | 9 | 28 | 31 | -3 | 23 |
| 14 | Wigan | 20 | 6 | - | 4 | - | 10 | 23 | 44 | -21 | 22 |
| 15 | Burnley | 21 | 5 | - | 5 | - | 11 | 22 | 43 | -21 | 20 |
| 16 | West Ham | 21 | 4 | - | 7 | - | 10 | 28 | 37 | -9 | 19 |
| 17 | Wolves | 21 | 5 | - | 4 | - | 12 | 17 | 38 | -21 | 19 |
| 18 | Hull | 21 | 4 | - | 7 | - | 10 | 20 | 42 | -22 | 19 |
| 19 | Bolton | 19 | 4 | - | 6 | - | 9 | 26 | 38 | -12 | 18 |
| 20 | Portsmouth | 20 | 4 | - | 2 | - | 14 | 18 | 32 | -14 | 14 |